KOYRDI RÚSDREKKAKOYRING 19 ÁRA GAMAL

# Eitt andarhald í tankaloysi

**RÚSDREKKAKOYRING Hugurin at sleppa suður í Eydnuna var góður, so eg gjørdi bara av at koyra sjálvur. Eg minnist, at vit vinmenninir avráddu at fylgjast til Oyrarbakka. Men eg minnist einki til, at eg av onkrari tápuligari orsøk fór einsamallur avstað við bilinum. Minnist heldur ikki, at eg fáar minuttir seinni rendi útav vegnum við Ljósá og varð slongur út. Minnist einki um at verða koyrdur til Havnar í sjúkrabili, ella at verða flogin á Ríkissjúkrahúsið, sigur Heini Festirstein av Eiði. Tað fór at vísa seg, at tiltikna jólaódnin tríggjar dagar seinni var eitt lot í mun til ta ódn sum tók seg upp í hansara unga lívi**

Heini sum í dag 43 ára gamal og sjálvlærdur miðlagrafikari, minnist, at vinmenninir og hann sum dreingir plagdu at fiska um kvøldarnar. Í frítíðini íðkaðu teir fótbólt og hondbólt, og vóru teir í haganum, runnu teir.

– Tað skuldi altíð henda okkurt og helst her og nú. Sum smádrongur var eg dagligur gestur á skaðastovuni. Var helst eitt sindur vøsutur og ótolin, tó ikki uttan fyri tað normala; eg fekk væl savnað meg um eitt nú at tekna í tímar.



Savnsmynd

### Flottan bil – flotta damu

16 ára gamal fór Heini til skips fyri at tjena pengar til ein bil.

– Tað var ein eydnurúsur at gerast vaksin. Mín mest ítøkiligi dreymur var at gerast arkitektur. Eg væntaði at fáa eitt vanligt lív sum øll onnur við konu og børnum. Hjá ungum monnum á bygd í áttatiárunum var dreymurin at fáa ein bil. Tá var einki internet ella úrval av sjónvarpsrásum. Bilurin var uppihaldsstað hvørt kvøld saman við vinfólki. Tá eg var heima, stuttleikaðu vit okkum og drukku, sum unglingar flest, og ferðaðust til stevnur um summarið. Í allar mátar eitt púra vanligt og virkið unglingalív.

– Við bilinum hevði tú størri frælsi og slapp hagar, tú vildi, tá tað hóvaði tær. Um vikuskiftini vóru bilar í roynd og veru barrir. Dansurin var liðugur klokkan 1, og so koyrdu tey ungu biltúr til klokkan 6 um morgunin. Átti tú bil, fekst tú lættari fatur á konufólki. Eg átti flottan bil, men var eisini flottur sjálvur, skemtar Heini.

### Lagnukvøldið

Seinasta sunnukvøld fyri jól var tiltikið gott dansikvøld á Eiði. Árið var 1988, og 19 ára gamli Heini og vinmenninir høvdu verið í býnum fríggja- og leygarkvøld, og hendan dagin kókaðu teir havhest, áðrenn teir ætlaðu í dans. Teir javnaðu allan dagin og kvøldið við. Í dansinum var tó einki serligt av fólki, og tí ætlaðu teir í staðin suður í Eydnuna á Oyrarbakka. Tað eydnaðist teimum tó ikki at finna nakran at koyra teir.

– Mín bilur stóð hjá einum vinmanni. Skyldkonan, sum hevði koyrt okkum kvøldini fyri, vildi gera væl og ikki geva mær lykilin sunnudag, tí hon visti, at eg drakk. Men eg fór heim eftir eykalyklinum og koyrdi einsamallur býttdjarvur og fullur út í myrku køldu náttina – ein túrur, ið bráðsteðgaði eina lítla lagnulødda løtu seinni við Ljósá.

> **19. november 2011**
> *Fyri tí mann er einsamallur, kann mann saktans hugna sær eitt sindur. So eg havi gjørt mær eitt fitt ostaborð at jagla upp á í alt kvøld :)*

### Tit missa dreingin

Foreldur Heina fingu tey boð, at tey mest sannlíkt fóru at missa sonin. Kortini varð hann dagin eftir sendur niður á Ríkissjúkrahúsið. Hann var illa meiðslaður, lá uttan vit, ryggurin var brotin í 12. geisla umframt at hann var



Mynd: Heinesen Myndir

> **11. september 2012**
> *Niðurstøða eftir Dag og Viku í kvøld: Vit hava nokk av jarðberjum og makreli, men mangla kvinnur og parkingspláss. Koyr á Føroyar!*

# KOYRDI RÚSDREKKAKOYRING 19 ÁRA GAMAL



*Sitatir av Facebook-vegginum hjá Heina:*

**27. januar 2012**

*At sita í trygdarbelti tá mann koyrur bil, kann sammetast við at vera í bjargingarvesti, tá vanlukka hendur á sjónum. Tað er bara eitt klikk og tað ER kul, ikki gloyma tað!*

uppskorin í nakkanum, beinunum, ørmunum og á bakinum. Hann bløddi álvarsliga og hevði nógvar pentir alla staðni.

Tá Heini 20 dagar seinni raknaði við úr koma á Ríkissjúkrahúsinum, rann spakuliga fram fyri hann:

– Eg hevði koyrt bil dýrandi fullur, blóðroyndin staðfesti eina promillu á 1,8. Eg hevði ikki bundið trygdarbeltið. Eg hevði koyrt á summardekkum á svartakálki. Eg hevði koyrt alt ov skjótt, tí eg var slongur langt úr bilinum.

– Fyrstu tveir mánaðirnar svaraði eg bara ja og nei, tá starvsfólk vendu sær til mín. Eg var beiskur og óður inn á meg sjálvan at liggja har sum ein kloddi og slapp ikki av við øðina, minnist Heini.

fluttur til uppvenjingarstað í Hornbæk. At byrja við var ógreitt, um hann fór at gerast førur fyri at ganga aftur.

– Í Hornbæk vóru onnur offur frá ferðsluvanlukkum, miseydnaðum sjálvmorðum, fólk ið høvdu kavað í ov grunt vatn, heilabløðingar og so framvegis. Mong vóru sjálvmorðshótt. Millum starvsfólk ráddi ein margháttligur tóni. Júst innkomin heilsaði ein fysioterapeutur mær við at spyrja, hvat var hent mær. Síðani segði hann læandi, at mann tað sama kann gera tað ordiliga, tá mann koyrir skít. Eg tók tað illa upp, sum eg lá har 19 ára gamal í hesum fremmanda. Kortini var hetta onkursvegna við til at herða meg, minnist Heini.

– Ein morgun komu tveir læknar, tveir sálarfrøðingar

**3. september 2012**

*Minnist til, kvinnur: Ein maður við einum sixpack (vøddar á búkinum), er samstundis eitt mannfólk, sum ongantíð kemur at elska tykkum líka nógv, sum hann elskar seg sjálvan.*

## Ikki mín Gud

Tó at Heini var einsamallur í bilinum, rakti vanlukkan onnur enn hann. Hann átti mammu, pápa, systkin og vinfólk, sum øll vóru góð við hann.

– Eg kendi, at eg hevði gjørt nakað skeivt, sum øll familjan sveið fyri. Vit tosaðu dagliga í telefon, og tey vitjaðu alt tað, tey kundu. Tað sama gjørdu vinmenninir. Onkur av mínum nærmastu hildu, at hetta var Guds vilji við mær. Hetta var tungt at bera í teirri neyð, eg var í. Tá helt eg fyri – eins og nú – at um Gud vil blaka meg í ein koyristól, er hann ikki mín Gud.

– Eg veit, at teirra hugburður var eitt slag av um-

og ein sjúkrasystir inn at tosa við meg – ein reiðilig tilbúgving. Tey bóru mær tey boð, at eg ikki skuldi vænta at ganga aftur. Tey høvdu sæð undurverk fyrr, men eg skuldi ikki vænta mær eitt.

– Hetta vildi eg avgjørt ikki góðtaka sum eina endaliga niðurstøðu og segði »NEI, eg fari at ganga aftur!« Tey endurtóku, at tað fert tú helst ikki. Tey royndu at fáa meg at venja meg við tað. Tað var ræðuligt, og eg vildi ikki lurta eftir hesum. Eg var púra á berum og royndi at skumpa hetta til viks – hevði so inniliga brúk fyri at hoyra okkurt jaligt. Alt var ræðandi og óveruligt. Eg var so ungur, lívið var ikki meiri enn byrjað, og kortini var eg so

**7. september 2012**

*Tá mann roynir at skifta kanal og fjarstýringin ringir, hevur mann drukkið for nógv vín.*

sorgan, men hetta er ein heimsspeki, sum eg ikki taki undir við, og sum ikki kann brúkast til nakað sum helst. Tað løgna var, at dagin eftir eg koyrdi meg til avlamis, átti systir mín ein son, so familjan sveimaði millum lív og deyða teir dagarnar.

## Gálgaskemt í Hornbæk

Eftir at hava ligið í strekki í tríggjar mánaðir á Ríkissjúkrahúsinum fyri at grøða brotið í rygginum, varð Heini

einsamallur og noyddist at fóta mær av nýggum.

## Ólavsøka á hjólum

Beint fyri ólavsøku varð Heini útskrivaður úr Hornbæk. Hann hevði lítlan hug at fara heim til Føroya.

– Tað var sum stóð eg millum tvey ymisk lív og visti ikki, hvat eg fór at megna í nýggju støðuni. Eg óttaðist fyri at byrja lívið uttan fyri

...framhald á síðu 6

**5. september 2012**

*Kvinnan sum uppfann setningin, »Øll mannfólk eru eins« var kinesisk. Og tað gevur meining, tí har eru allir eins.*

# KOYRDI RÚSDREKKAKOYRING 19 ÁRA GAMAL

trygga umhvørvið í Hornbæk. Har var lættari at sita í koyristóli enn á Eiði. Tað var alt annað enn kul 19 ára gamalur at skula sita í koyristóli restina av lívinum.

– Øll støð mintist eg bara sum gangandi, og øll kendu meg bara sum lættan á fótum. Hevði eina kenslu av, at fólk hugdu skeivt og hugsaðu, at eg hevði sjálvur skyldina. Eg var fullur í skuldarkenslu og hugsaði: »Ja, eg veit tað væl. Hvat er at siga?« Ikki bar til at renna undan.

– Hesa tíðina hevði eg tað best saman við fólki, sum eg ikki kendi frá mínum fyrra lívi. Tey, eg kendi fammanundan, spurdu meg, nær eg fór at ganga aftur.

– Eftir regluliga uppvenjing í fýra ár gjørdist greitt, at eg fyribils noyðist at verða sitandi í koyristolinum. Eg eri púra lamin frá knøunum niður, 80% í lørunum og annars lutvís frá miðjuni.



**18. september 2012**

*»Hesin maðurin rennur ikki undan ábyrgd« ...mítt slogan, um eg stilli upp til næsta val.*

Mynd: Heinesen Myndir

**1. oktober 2012**

*Um eg hevði eina konu, sum kanska einaferð í framtíðini skal hava eina nýggja mjørn, so skuldi tað verið eitt kopi av mjørnini hjá Shakiru ...*

**6. september 2012**

*Ikki sørt mann følir seg óynsktan, tá mann hoyrur um eitt etiskt ráð, sum skal avgera um mann er góður nokk til hetta samfelagið. Hatta er eitt pilbýtt hugskot – ella ótrúliga »brekað« – eftir mínari meining. Tað skal vera pláss fyri øllum, eisini teimun sum bera brek, ferdugt!*

## Til verka

Okkurt mátti henda. Heini mátti byrja av nýggjum og legði fyri við 10. flokki við Áirnar um heystið – minni enn eitt ár eftir vanlukkuna. Síðani starvaðist hann fyrst á Hjálpartólamiðstøðini og síðani hjá ComData, har áhugin fyri kunningartøkni varð birtur. Seinni flutti hann til Danmarkar, har hann tók venjaraútbúgving á ítróttarháskúla.

– Eftir at hava tikið HF í Danmark tók internetið okkum øll á bóli við markleysum nýggjum møguleikum. Mær hevði altíð dámað at tekna, og mær var greitt, at eg skuldi starvast við onkrum, sum hevði við internetið at gera.



*Kendi danski rasarakoyrarin Jason Watt og Heini Festirstein. Jason Watt gjørdist lamin eftir eina motorsúkkluvanlukku 1999. Í 2009 vitjaði hann í Føroyum í sambandi við lýsingarátak hjá Bygma. Tá hitti hann Heina Festirstein. Teir eru javnaldrar og hava sama brek*

**17. mai 2012**

*Eg og mín koyristólur: Ein kærleiks søga*
*Brot: ... Eg havi hatað øll hasi tingini, og mest av øllum havi eg hatað meg sjálvan fyri tað eg gjørdi – og so havi eg hatað koyristólin. Men – sum stockholmsyndromið – fór eg at elska mín koyristól. Hann er í veruleikanum tað sum hevur allar stórsta týdning fyri meg, um eg skal hava dagligdagin at hanga saman. Hann er altíð her fyri meg, hann bíðar við songarstokkin, tá eg sovi, hann bíðar eftir mær, tá eg eri undir brúsu, hann tímur altíð við mær í býin, til fótbólt, til arbeiðis, at keypa inn og út at eta. Tað er líka mikið hvussu keðiligt veðrið er, so er hann har ... og hann er altíð glaður og góður við øll, júst sum tann sum situr á honum! Eg haldi faktiskt, at vit eru eitt nokkso fitt par, og eg fari at elska hann alt mitt lív.*
*Og eg sum helt meg sita á trupulleikanum ... tað er/var faktist øvut.*
*Frá nú av eitur mín koyristólur, Pamela!*

## Dýrmæta lív

Síðani Heini flutti heim í 1998, hevur hann starvast við grafiskari sniðgeving, nú á marknaðardeildini hjá Føroya Tele:

– Her er gott at vera, og lívið er so forbannað gott. Eg gleðist hvønn dag um lívið, men kundi sum flestøll onnur ynskt mær okkurt afturat. Eg hugsi ofta, at lívið kundi verið øðrvísi, um eg ikki gjørdi tað býtta hasa vetrarnáttina. Við hvørt fyllir tað nógv, men tað er ikki vist, at eitt lív til gongu var so nógv betur enn hetta lívið. Eg føli, at eg havi nakað at geva hesum landinum og teimum, sum eg eri góður við – ikki minst mínum vinum.

## Tók ongan við sær

Heini bøtir dýrt fyri eina býtta gerð í ungdómsins hugmóð. Men hann tók ongan við sær.

– Eg havi mangan hugsað, at tað hevði verið steinur oman á byrðu, um onnur vóru við í vanlukkuni. At skulað livað við, at onkur annar doyði ella varð løstaður fyri lívið, av einari dáragerð sum at koyra fullur, hevði eg avgjørt havt tað óluksáliga ringt við.

– At koyra ávirkaður er eitt tað allar tápuligasta, mann kann finna uppá. Tað er altíð ein onnur loysn, um tú skal flytast frá A til B.

– Um onkur bað meg lata vera at koyra hatta kvøldið, hevði eg ivaleyst biðið tey hildið kjaft. Sum ungur hugsaði eg ikki reiðiliga klárt. Men upplýsing má til fyri at ávirka atferðina hjá fólki. Ræðuátøk ávirka meg eisini.

## Ongantíð til sættis

Foreldur Heina høvdu ikki koyrikort, og hugburðurin í barnaheiminum var púra greiður, at koyring og rúsdrekka ikki hoyra saman. Heini misti tveir javnaldrar av rúsdrekkakoyring árið fyri hann sjálvur var fyri vanlukku. Hann undrast sjálvur, at hann ikki lærdi av tí.

– Millum okkum ungu var hugburðurin til rúsdrekkakoyring lagaligur. Tað varð ikki viðmerkt, um onkur drakk 3-4 øl, meðan hann koyrdi. Men hetta kvøldið var fyrstu ferð, at eg koyrdi ávirkaður.

– Eg komi ongantíð reiðiliga til sættis við støðuna. Onkra staðni er ein eldur – ein vón um at sleppa at ganga einaferð. Tað er ringt at góðtaka, at eg ikki kann tað, sum øll onnur kunnu.

## Facebukkur við lít

Facebookvinir Heina kenna hansara originalu orðaspøl og hittinorð, sum fáa okkum at øtast, undrast og smílast.

– Tú ert bara eitt klikk frá fólki, og tú kemur skjótt í samband við nógv fólk. Facebook er størsta frambrotið innan internetið og 8. undrið í heiminum. Her er eisini nógv fjas og lort, men tað má mann taka við. Eg havi næstan altíð facebook tendrað, og havi einar 2.300 vinir.

– Í dag er internetið tað, sum bilurin var, tá eg var ungur. Bilurin tá var brúktur at vinna tær eitt netverk. Í dag fert tú á facebook í staðin. Tilboðini eru mong í mun til tá. Eg haldi, at tey ungu í dag hava onnur áhugamál enn bilar, tíbetur, fegnast Heini.

**12. oktober 2012**

*Um Tósvøllur var innilokaður, skuldi hann kallast Tórshøll. Og nú gongur leiðin til dystin. Koyr á Føroyar! :)*

**25. oktober 2012**

*½ í støðum!*